# ÍTRÓTTUR

SAMBAND
JÁKUP MØRK
JAKUP@SOSIALURIN.FO
TLF. 341800

# Ísland heldur ondini

**Tvey fjórðapláss eru besti avrik Íslands. Nú verður vóna, at hondbóltslandsliðið kann vinna seg í sína fyrstu finalu**

OL
*Heri Simonsen*
*heris@sosialurin.fo*

Millum kl. 12.15 og 14.00 íslendska tíð verður neyvan nógv ferðsla á íslendsku vegunum, tí tá - kl. 13.15 føroyska tíð - byrjar hálvfinalan millum Ísland og Spania. Tvær ferðir hevur Ísland verið í einari hálvfinalu í einum endaspæli fyri A-landslið. Fyrra ferðin var, tá OL var í Barcelona í 1992, onnur ferðin var tá EM var í Svøríki í 2002. Báðu ferðirnar tapti Ísland hálvfinalurnar og seinni eisini bronsudystin.

Í OL í 1992 tapti Ísland 19-23 ímóti SNG í hálvfinaluni, og 20-24 ímóti Fraklandi í bronsudystinum. Nú vónar íslendski almenningurin, at Óli Stef og hinar tjóðarhetjurnar kunnu koma eitt stig longur, og koma heim aftur við einum heiðursmerki.

Ísland hevur neyvan havt betri málverja, enn Páll Gústavson, og fleiri enn Ólafur Stefánson hava tikið ábyrgd á vøllinum. Roknar ein dystin ímóti Korea frá, so hava íslendingar skorað 30 mál ella fleiri í 5 av 6 dystum á olympisku summarleikunum í Beijing. Vónandi eru íslendingar eins raskir at skjóta mál ímóti spaniólum í dag.



*Fagnaðurin hevur verið øgiligur, tá Bjkørgvin Gustavsson og hinir íslendsku hondbóltsharrarnir hava verið á vøllinum í OL í Beijing*

*Mynd: Polfoto/AP*

# Fingu staðfest sigurin undir brúsini

**Koreansku spælarnir fóru ikki av vøllinum, fyrr enn 20 minuttir aftaná, at dysturin var lokin.**

OL
*Heri Simonsen*
*heris@sosialurin.fo*




*Fagnaðurin var øgiligur, tá norsku hondbóltskvinnurnar fingu staðfest, at seinasta málið hjá Gro Hammerseng taldi við*

*Mynd: Polfoto/AP*

Korea vil ikki góðtaka, at norska Gro Hammerseng slepti bóltinum - skeyt - áðrenn klokkan slóg 60:00 í hálvfinaluni millum Noreg og Korea, tá hon skoraði dramatiska sigursmálið til 29-28. Men lítið hjálpir hjá Korea at klaga.

20 minuttir aftaná dysturin var liðugur staðfesti altjóða hondbóltssambandið, IHF sigurin, og legendariska sigursmálið hjá norsku stríðskvinnuni, Gro Hammerseng verður standandi. Norsku genturnar vóru undir brúsini tá staðfestandi boðini um sigurin komu frá IHF um, at tær høvdu vunnið seg í finaluna. Korea vil tó ikki sleppa málinum. Fleiri av koreansku spælarunum sótu og bóðu aftaná dystin, og gingu tað 20 minuttir, áðrenn tær fóru til skiftisrúmið.

Men alt bendir á, at Korea má brynja seg til at spæla um bronsuheiðursmerkini. Aftaná tvær silvur og eina bronsu vónar norski almenningurin, at norsku hondbóltskvinnurnar loksins vinna OL-gull. Í finaluni spæla tær móti Russlandi.

# Triðji føroyingurin ávegis til Aberdeen

**Heimasíðan hjá Aberdeen skrivar, at Rógvi Holm møguliga fer at spæla við Aberdeen**

FÓTBÓLTUR
*Uni Holm Johannesen*
*uni@sosialurin.fo*

- Vit byrjaðu sambandið við føroyskan fótbólt fyri tveimum árum síðan, tá føroysk ungdómslandslið luttóku í Aberdeen International Footbal Festival. Vit vóru hugtiknir av dugnaligu evnunum, har serliga tveir leikarar stóðu seg væl.

Fyri góðari viku síðan kom fram, at ungu Hallur Hansson og Gilli Sørensen úr HB komandi tíðina skulu royna seg í skotska felagnum Aberdeen. Heimasíða felagsins skrivar nú somuleiðis, at møguleiki er fyri, at sáttmáli eisini verður gjørdur við argjamannin Rógva Holm. Høvuðsvenjarin fyri ungdómsdeildina, Lenny Taylor, frøist um føroyingarnar.

- Vit eru farnir nýggjar leiðir, nú vit fáa føroyingar hendan vegin. Men tað er tað eisini fyri hesar leikararnar, og vit fara at gera alt fyri, at teir trívast, slær Lenny Taylor fast.



*Nógv verður gjørt burtur úr nýggju føroysku spælarunum á heimasíðuni hjá Aberdeen*